

# Trygdarleiðari

## Statoil Føroyar søkir eftir kvinnu ella manni at leiða trygdararbeiði felagsins

### Starvið

Sum trygdarleiðari stendur tú á odda fyri heilsu-, trygdar- og umhvørvisøki okkara, eisini kallað HTU. Starvsøkið fevnir um alt virksemi okkara, t.e. útkoyring, goymslur, hitatænastu, bensinstøðir, sølu og fyrisiting.

Statoilsamtakið raðfestir HTU-økið sera frammarlaga. Arbeiðið verður skipað við íblástri frá toymum, ið virka tvørtur um landamørk.

### Arbeiðsuppgávur

Dagurin sum trygdarleiðari er fjølbroyttur. Nakrar av uppgávunum eru at:

- Skipa fyri, at HTU framhaldandi er natúrligur partur av arbeiðsdegnum hjá starvsfólki okkara
- Leiða og skipa innanhýsis HTU-bólkar
- Gera innanhýsis mannagongdir
- Fylgja menningini við hagtølum
- Skipa fyri skeiðum
- Vera við í HTU-toymum hjá Statoilsamtakinum

### Tínir førleikar

Tú dugir væl við fólki, ert framtøkin, arbeiðir sjálvstøðugt og skipar arbeiði títt væl. Tú hevur hegni at bera orð tíni fram, bæði skrivliga og munnliga, og enskt er eingin trupulleiki fyri teg.

Fakliga hevur tú viðkomandi útbúgving ella royndir. Hevur tú ikki tað, men heldur teg vera egnaðan kortini, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn, har tú greiðir frá, hví júst tú ert rætta fólkið til starvið.

### Okkara tilboð til tín

Vit bjóða tær eitt gott starv, har tú á mangan hátt skipar dagin eftir vild. Sum partur av altjóða samtaki bjóða vit tær góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning, har tú gerst partur av HTU-toymum hjá Statoilsamtakinum.

Starvið verður skipað sum stápsfunktión við beinleiðis tilvísing til leiðsluna. Lønin verður sambært avtalu, og eftirlønartrygging fylgir við.

Vilt tú vita meira, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johan Poulsen, tekniskan leiðara, ella Niels Juel Nattestad, stjóra, á telefon 34 35 00.

### Hevur starvið tín áhuga?

Send eina umsókn í seinasta lagi 10. oktober 2006 til frnjn@Statoil.com, ella send vanligt bræv við frámerkinum "Trygdarleiðari" til:

P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Umsókn tín verður viðgjørd í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarunum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða umleið 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.*

**STATOIL**
*– fyri viðskiftafólk okkara*

REPROZ

góðskan er tann kenda
sniðið er nýtt




MBM

TEAM85